# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík

**_________/_________ Síða**

**Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig,skr.**

## Býráðsfundur mánadagin 29. februar 2016 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| **1.** | **16/00047**<br>**Fyrispurningur um sundurbýti av parti av matr. nr. 9 við Gøtugjogv**<br>Áheitan/ fyrispurningur er komin um at matr. nr. 9 við Gøtugjógv verður sundurbýttur til Filadelfia og Betania, ella møguliga at Eysturkommuna eisini skal eiga ein part av økinum.<br><br>Umsitingin hevur kannað eftir um kommunan hevur nakra ætlan fyri hetta økið, men kann ikki koma fram á nakra verkætlan ella annað til hetta málið. Umsitingin mælir frá at yvirtaka part av matr. nr. 9 við Gøtugjógv. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen.<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Hanus Jacobsen |
| **2.** | **16/00027**<br>**Umsókn frá SEV um kaðalgrøv eftir Leirvíksvegnum**<br>SEV hevur sent umsókn um at leggja 60 KV leiðingar 3x1x200 mm Al ígjøgnum Leirvíksvegin. Kaðalin verður lagdur frá nýggjari koblingsstøð sum skal byggjast Fyri innan Eið og inn til Leirvíkstunnilin –Leirvíksmegin. Kaðalgrøvin verður mitt í Leirvíksvegnum.<br><br>Umsitingin mælir til at SEV fær loyvi til at grava fyri, leggja kaðalar og tyrva aftur. Somuleiðis skal vegurin asfalterast aftur. Kommunan hevur onga ábyrgd fyri hesum arbeiði, grevstur, maskinur, grøv, styrki í vegnum, trygd ella annað í sambandi við hetta arbeiði.<br><br>Viðm. skal eisini, at Leirvíksvegurin verður nógv brúktur av fólki sum ganga, súkkla og koyra, tí má hædd takast fyri hesum meðan arbeiði verður gjørt.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva loyvi við krøvum um ábyrgd sum nevnt í frágreiðing frá umsitingini, og at allur vegurin verður asfalteraður aftur fyri at tryggja styrkina | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 29. februar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

aftur í vegnum.

**3.** **16/00033**

**Umsókn um loyvi at leggja niður oljutangar á Effo/Fast støðini í Skálabotni**

Eysturkommunan hevur móttikið umsókn um at leggja nýggjar oljutangar niður við Effotøðina í Skála-botni og at fáa møguleika hjá størri bilum at fylla á.

Staðsetingin av tangunum er inni á teirra matrikli, móti vestara markinum, t.v.s. niðanfyri verandi bygning og í hædd við kjallaran.

Umsitingin mælir til at Effo fær loyvi til at seta nýggjar tangar niður og at gera umstøðurnar hjá størri bilum at fylla á tangan. Áðrenn loyvi verður útskrivað, skal Landsverk hoyrast í málinum.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva byggiloyvi at leggja nýggjar oljutangar til Effo støðina. Byggiloyvið verður ikki fingið fyrr enn svar og heimild er komið frá Landsverki. grundgevingunum hjá umsitingini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**4.** **15/00433**

**Bátasavnið í Leirvík – tilboð uppá skakt og lyft**

Í gjøgnum árið 2015 var arbeitt við loysnum og tilboðum til eina skakt og lyft til bátasavni. Uppskotini og tilboðini vóru ymisk í mun til staðseting av lyftu og um lyfta skal verða úti ella inni í bygningi. Tíðin dróg út og arbeiði var ikki gjørt í 2015.

Játtan 2015/16 til skaktina og lyft er á konto 5.24.32.511 Søvn og mentanararvur á kr. 670.000,00 og tí er neyðugt við eykajáttan á kr. 150.000,00

Umsitingin mælir til at taka av innkomnum tilboðum til skaktina/húsið og til lyftu. Somuleiðis verður biðið um eykajáttan uppá kr. 150.000,00.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarksipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 29. februar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til taka av tilboðnum og gera skakt og lyft í 2016, og veita eykajáttan á kr. 150.000,00

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, og at peningurin til eykajáttan veður tikin av innistandandi

**5. 15/00107**

**Vatnreinsiverk Uppi á Brekkum í Leirvík – tilboð uppá reinsiskipan og el-arbeiðstøkuna**

Kommunan hevur móttikið tilboð uppá reinsverkið, tilboð fevna um komplet reisiverk, automatik og ljós til bygningin sum er bygdur til vatnreinsiverkið.

Umsitingin mælir til at tikið verður av fyriliggjandi tilboðum, sum samlað er 1.671.295,00 uttan mvg.

Peningur er avsettur til nevnda arbeiðið á konto 6.30.21.511 Vatnveiting (Løgujáttan) og er 1.7 mill. Kr, og neyðugt er tí við eykajáttan uppá kr. 100.000,00.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og veita eykajáttan á kr. 100.000,00

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilboðnum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, og at peningurin til eykajáttan veður tikin av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarksipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**6. 16/00051**

**Tilboð uppá nýggjar pumpur til hitaverkið í skúlanum í Leirvík**

Í sambandi við at pumpurnar til hitaverkið byrja at ganga fyri, er innheinta tilboð at fáa hesar skiftar út. Nýggjar pumpur fara samstundis at minka um raksturin á hesum økinum, tí at tær gomlu pumpur-nar eru dýrar í rakstri.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarksipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 29. februar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Umsitingin mælir til at pumpurnar verða útskiftar og at eykajáttan uppá kr. 170.000,00 verður játtað til arbeiðstøkuna, tí at eingin játtan er til hetta arbeiði.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at skifta pumpurnar til hitaverkið á skúlanum í Leirvík, og veita eykajáttan á kr. 170.000,00

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilboðnum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, og at peningurin til eykajáttan veður tikin av innistandandi.

**7. 16/00059**
**Vinnuøki D Kaiøkið í Norðragøtu**

Upplegg/skilmarking frá teknisku umsiting til vinnuøki D á kaiøkinum í Norðragøtu. Støða skal eisini takast til sølu/leigu/íbindingargjald

Vinnunevndin tekur undir við upplegginum frá teknisku umsiting fyri kaiøkið.Vinnunevndin mælir til at broyta byggisamtyktina til neystaøkið, frá áseting D til áseting G (t.e. økið millum Tollaksgøtu og Tróndargøtu).

Vinnunevndin mælir til at vinnustykkini verða til leigu.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og at leiguprísurin verður 16,50 kr./m$^2$ umframt eitt íbindingargjald á 20.000,00 kr.

Málið tikið av skrá.

**8. 16/00058**
**Vinnuøki C2 í Norðragøtudali**

Upplegg/skilmarking frá teknisku umsiting til vinnuøki C2 í Norðragøtudali. Støða skal eisini takast til sølu/leigu/íbindingargjald

Vinnunevndin mæla til uppskot ,1 og at broyta umhvørvisflokking til flokk 4.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 29. februar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Vinnunevndin mælir til at vinnustykkini verða seld.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og at søluprísurin verður 300 kr./$m^2$

**9. 16/00010**

**Vinnuøki C2 á Kráartanga**
Støða skal takast til sølu/leigu/íbindingargjald

Vinnunevndin mælir til at vinnustykkini verða seld.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og at søluprísurin verður 300 kr./$m^2$

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini g fíggjarnevndini.

**10. 16/00011**

**Vinnuøki C2 á Toftanesi í Leirvík**
Støða skal takast til sølu/leigu/íbindingargjald

Vinnunevndin mælir til at vinnustykkini verða til leigu. Vinnunevndin mælir til at íbindingargjald verður ásett.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og at leiguprísurin verður 16,50 kr./$m^2$ umframt eitt íbindingargjald á 20.000,00 kr.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini g fíggjarnevndini.

**11. 16/00062**

**Eykajáttanir februar 2016**
Vísandi til fyriliggjandi yvirlit yvir játtanir fyri 2015, mælir umsitingin til at veita eykajáttanir á íalt kr. 2.565.000,00 (løgujáttanir). Talan eru um játtanir sum eru játtaðar í 2015 og fluttar til 2016, tí at arbeiðini ikki er liðug ella ikki gjørt men ætlandi skulu gerast í 2016.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og veita eykajáttanir

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 29. februar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

á íalt kr. 2.565.000,00 kr., og at peningurin verður tikin av innistandandi

**12. 16/00036**

**Umsókn um stuðul - Víkingur**

Mentanarnevndin mælir til at játta Víkingi stuðul á 400.000 kr. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510.20 (Stuðul til ítrótt)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Brandur Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanus Jacobsen og Erik Lervig vóru úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**13. 16/00031**

**Umsókn um stuðul – Eldrafelagið Fjallið**

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á 35.000,00 kr. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 (Stuðul til mentan).

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**14. 15/00386**

**Umsókn um stuðul - Grót**

Mentanarnevndin mælir til at stuðla Tónleikasamtakinum Grót við 40.000,00 kr. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 (Stuðul til mentan).

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Oluffa Joensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**15. 16/00037**

**Umsókn um stuðul – Losjan Glotti**

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á 40.000,00 kr. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 (Stuðul til mentan).

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 29. februar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**16. 16/00055**

**Umsókn um stuðul – Skótalið Leirvíks Pálls – KFUM skótar**

Mentanarnevndin mælir til at stuðla Skótaliði Leirvíks Pálls við 40.000,00 kr. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 (Stuðul til mentan).

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________